# Jenis má bíða nakrar vikur afturat eftir Løgregluni

**Tað verður ikki enn, at løgreglan tekur støðu til um Jenis av Rana skal ákærast ella ikki**

RÆTTARTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Enn er løgreglan ikki til reiðar at taka støðu til um Jenis av Rana skal ákærast fyri at hava brotið sínar skyldur sum lækni.

Tað var í oktober í fjør, at tað kom alment fram, at Jenis av Rana varð meldaður fyri at hava brotið sínar tagnarskyldu sum kommunulækni.

Hetta skuldi vera hent, tá ið ein ung genta í kommunulækna-viðtalu hjá Jenis av Rana skal hava fortalt honum, at pápin hevði verið ónærisligur ímóti henni.

Men ístaðin fyri at hava hildið sína tagnarskyldu, skuldi Jenis av Rana havt fortalt pápanum, hvat dótturin hevði sagt.

Í slíkum føri hevur læknin eisini skyldu at boða avvarðandi myndugleikum frá, men tað gjørdi hann heldur ikki eftir tí, sum er komið fram, og eisini tað er hann meldaður fyri.

Jenis av Rana hevur alla tíðina tvíhildið um, at alt hetta er tann beri heilaspuni og at hann onki kennur til hetta yvirhøvur.

Men hóast tað nú eru 9-10 mánaðir eitt ár síðani, at málið varð meldað, hevur Løgreglan enn ikki tikið støðu til, Jenis av Rana verður ákærdur ella ikki.

Fyrst í mai varð kommunulæknin avhoyrdur, men síðani hevur hann onki frætt aftur, sigur hann.

Karen Marie Olesen, fúti, sigur, at enn er hon ikki til reiðar at taka støðu til málið.

Og hon metir, at tað ganga nakrar vikur afturat, áðrenn ein avgerð kann takast.

Pápin, sum skuldi havt verið ónærisligur ímóti dótturini, varð annars ákærdur, men í síðstu viku varð hann fríkendur í Føroya Rætti.

Og nú dómur er fallin í upprunanum til málið ímóti Jenis av Rana, hevði hann eina vón um, at løgreglan fór at taka eina skjóta støðu, eisini í hansara føri.

- Dómurin í farnu viku er prógv um, at talan var ikki um nakað mál, sigur Jenis av Rana og tí hevði hann vónað, at ein skjót avgerð eisini fór at verða tikin um hansara mál.

Men so einfalt er málið ikki, tí fútin sigur, at enn er støða ikki tikin til um dómurin í Føroya Rætti í farnu viku, verður skotið inn fyri landsrættin.

Fútin dugir ikki at siga, nær avgerð verður tikin í málinum um Jenis av Rana, men hon væntar at nakrar vikur ganga afturat.

Jenis av Rana er bæði politikari og lækni og tí er tað av serligum týdningi, at fólk kunnu hava álit á honum. Spurningurin er tískil um løgreglan følir eina serliga skyldu at taka eina skjóta avgerð í slíkum føri fyri ikki at leggja størri trýst á partarnar enn neyðugt.

Tað einasta, fútin vil siga í hesum sambandi, er, at avgerðin verður tikin so skjótt, sum yvirhøvur tilber.



*Vit taka støðu um Jenis av Rana so skjótt, sum yvirhøvur tilber, sigur karen Marie Olesen, fúti*

Jenis av Rana:

# Hetta er ræðuligt at liva við

**Jenis av Rana er skelkaður í sínum innasta grundvølli av løgregluni**

RÆTTARTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er óhugnaligt, at ein kann verða soleiðis forfylgdur í einum framkomnum samfelagi.

Jenis av Rana er skelkaður í sínum grundvølli av Løgregluni.

Ein rættiliga fámæltur Jenis av Rana heldur, at tað er heilt ófatiligt, at Løgreglan ikki enn hevur tikið støðu til um hann skal ákærast ella ikki.

- Eg havi ikki orð fyri at tað skal bera til, at borgarar í einum demokratiskum samfelagi verða soleiðis viðfarnir.

- Eg havi havt eina sannføring um, at vit liva í einum rættarsamfelagi, men tað eri eg farin at ivast stórliga, sum støðan er nú

Hann sipar til, at tað nú er næstan eitt ár síðani, at hann varð lagdur undir at vera lógbrótari í sínum yrki sum kommunulækni í Havn.



*- Hetta er ein ómetaliga torført støa hjá mær, mínari familju, mínum sjúklingum og mínum politiska baklandi at vera í, sigur Jenis av Rana*

- Síðani tá hevur øll familjan, allir mínir sjúklingar og alt mítt politiska bakland í næstan eitt heilt ár livað við illgrunanum um, at eg eri lógbrótari.

- Og tey, sum skulu handhevja lógina, tykjast ikki at leggja nakað í, at ein borgari verður hongdur út at vera lógbrótari.

- Hetta er ein ræðulig støða at vera í, bæði hjá mær, hjá mínari familju, hjá øllum mínum sjúklingum og øllum mínum politiska baklandi.

- Tað er ikki orð fyri, hvussu tyngjandi hetta er. Hetta oyðileggur alt, leggur hann aftur. Men hann vil ikki útgreina hetta nærri.

- Men tað gevur ikki serliga stóran arbeiðsførleika at liggja undir eini skuldseting fyri lógarbrot.

Upprunin til málið, har ein pápi varð ákærdur fyri at hava gjørt seg inn á dóttrina, varð fyri í Føroya Rætti, men í farnu viku varð pápin fríkendur.

Av tí sama hevði Jenis av Rana eisini vónir um, at hansara mál fór at fáa eina skjóta avgerð, serliga tá ið hann hugsar um støðuna, hann er í sum lækni og politikari.

Tí heldur hann, at tað er heilt ófatiligt, at málið dregur út og at onki hevur frætt frá Løgregluni yvirhøvur, uttan ta einu ferðina, tá ið hann var biðin at koma til avhoyringar og tað var avgreitt fyrst í mai.

Hann hevur hug at samanbera hetta málið við støðuna, sum tók seg upp í tiltikna landsdystinum í fótbólti ímillum Danmark og Svøríki, har ein danskur leikari varð meldaður fyri at sláa ein svenskan leikbróður í búkin.

- Tað tók løgregluni 20 dagar at koma til eina niðurstøðu í málinum og so varð málið avgreitt. Men nú er næstan eitt heilt ár síðani at eg varð lagdur undir illgruna og tað er toppmált.

Hann vísir á, at hann hevur arbeitt sum lækni alla hesa tíðina og hann heldur, at tað ger málið serliga tyngjandi, tí hann ivast ikki í at sjúklingarnir innast inni sita við einum ótryggleika um tey nú kunnu líta á læknan og at hann heldur sína tagnarskyldu.

- Tað er ein ómetaliga torført støða hjá mær sum lækni og hjá mínum sjúklingum at vera í, sigur Jenis av Rana og tí heldur hann, at Løgreglan skyldar øllum pørtum at taka eina skjóta avgerð.

Og hann tvíheldur framvegis um, at hann er púra ósekur.

-Alt hetta kenni eg onki til, so einfalt er tað, sigur hann.

Men tá ið tú tosar um forfylging, heldur tú tá, at talan er um politiska forfylging?

- Tað ført tú meg ikki at siga, men tað skerst ikki burtur, at eg siti eftir við eini kenslu av, at eg havi onga rættartrygd. Um hetta so er galdandi bara fyri meg, ella um tað er galdandi fyri øll, veit eg ikki, sigur Jenis av Rana.